| LD-Rundskriv | Dagur 12.12.2008 | Ár-nr. **2008 -2** |
|---|---|---|
| Til<br>**Stovnar hjá landinum** | J.nr. 8300-0013/2008 | Síða **1 /1** |
| Heiti<br>**Rundskriv um eftirlønargjald, tá ið fólk starvast eftir 67 ára aldur** | | |

1. Í sambandi við at fráfaringaraldurin hjá almennum starvsfólkum er hækkaður úr 67 ár upp í 70 ár, verða kunngjørdar hesar reglur um eftirlønargjaldið hjá starvsfólkum, sum hava fylt 67 ár.

2. Fæst avtala í lag við eftirlønarveitaran, ella nýggj eftirlønaravtala verður gjørd, kann arbeiðsgevarin flyta eftirlønargjaldið sum áður.

3. Eftirlønargjaldið kann verða útgoldið sum løn. Hvørki frítíðarløn ella frítíðaraískoyti verður goldið av eftirlønargjaldinum.

4. Tey, sum arbeiða niðursetta tíð, men fáa eftirlønargjald sum varð starvstíðin ikki sett niður, kunnu tó ikki fáa útgoldið eftirlønargjald sum løn størri enn hvat svarar til setanarbrotið.

5. Hettar rundskriv er ikki galdandi fyri eftirløntar tænastumenn.

Fíggjarmálaráðið tann 12. desember í 2008

**Jóannes Eidesgaard**
Landsstýrismaður

Snorri Fjallsbak